## Teitur á konsertferð

Teitur Lassen fer á stóra konsertferð í februar. Ferðin byrjar á Train í Århus, tann 15. februar. Síðani fer Teitur at hava fýra aðrar konsertir í Danmark, áðrenn leiðin gongur til Stockholm og Gøteborg hinumegin Oyrasund. Tær konsertirnar verða 4. og 5. mars. 17. mars hevur hann eina konsert í Belgia, og síðani fer Teitur at hava sjey konsertir í Týsklandi. Fyrsta konsertin í Týsklandi verður 25. mars, og konsertferðin endar við eini konsert í Køln 1. apríl

# Politiskt Túnatos






*Her sita tey í Rás2 hósdagin. Petur í Túni, sum stillar upp fyri Tjóðveldi, Kári Petersen fyri Sjálvstýrisflokkin og Erla Berghamar Sørensen fyri Fólkaflokkin*

**Tey stilla øll trý upp til løgtingsvalið. Tey eru øll trý systkinabørn, men tey eru øll í hvør sínum flokki**

VAL 08
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tey stava øll úr Túni á Toftum. Og tey stilla øll upp til løgtingsvalið, sum verður nú 19. januar.

Petur í Túni stillar upp fyri Tjóðveldi, Kári Petersen – sonur Karolinu Petersen, sum var landsstýriskvinna fyri Framsóknarflokkin í 1988-89 við almanna- og kommunumálum – sum stillar upp fyri Sjálvstýrisflokkin, og Erla Berghamar Sørensen, sum stillar upp fyri Fólkaflokkin.

Og fyri at fullfíggja politiska spektrið er eitt fjórða systkinabarn gift Jógvani við Keldu, sum kortini ikki stillar upp hesaferð.

Tað er einastu ferð, at politikkur hevur verið ein trupulleiki í familjuni, minnist Kári Petersen. Og tað komst av, at Karolina noktaði Havnini og Klaksvíkini at upptaka lán upp á kommunurnar. Tað fall ikki í góða jørð hjá Jógvani við Keldu, sum tá var borgarstjóri í Klaksvík.

Men politiskt áhugað eru tey so, tó at tey stilla upp fyri hvør sín flokk. Og sum tey taka til: Tað verður so ikki familjan, sum fer at gera munin, tá atkvøðurnar skulu teljast saman.

# Maður handtikin í Deniz-morðinum

**Svenska løgreglan handtók mikudagin ein 42-ára gamlan mann í Göteborg, sum er illtonktur fyri at hava knívdripið lektorin við Örebro universitet, føroyskt gifta Fuat Deniz**



*Rúna í Baianstovu, situr nú einsamøll eftir við trý ára gomlu dóttrini, Emilia, og vaksnu synunum*

Svenska løgreglan hevur í longri tíð havt illgruna til ein mann í Göteborg fyri at hava framt morðið á assyriska lektorinum við Örebro universitet, Fuat Deniz, sum var giftur við Rúnu í Baianstovu.

Tað skriva svensk bløð.

Sagt verður, at handtikni maðurin er skyldfólk hjá dripna Fuat Deniz, og at tað er próvfast, at hann var staddur í Örebro 11. desember, tá morðið varð framt.

Somuleiðis er greitt, at hann hitti Deniz hendan dagin.

Hinvegin vil løgreglan ikki upplýsa um, hvat motivið til morðið var, og um drápsknívurin er funnin.

Tað stendur kortini greitt, at løgreglan í longri tíð hevur havt illgruna til hendan mannin. Hann er sum skilst eisini av assyriskum uppruna, eins og Fuat Deniz.

Svensk bløð hava eisini tosað við Rúnu í Baianstovu, sum er lættari um hjartað, nú ein maður er handtikin í málinum.

Hon sigur eisini, at hevði tað ikki verið fyri familjuna, systrar og mammu, veit hon ikki, hvussu hon hevði klárað at komi gjøgnum truplu tíðina.

